# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Solberg Christiansen

**f. 7. des. 1919 – d. 2. apr. 2008**

**in memoriam**

*Vit eiga í landinum livandi varðar,
sum vísa um víddir, hvar gøtan er greið,
um grýtut er gjótan, um stíggjur hann snarar,
teir lýsa í lendi, hvar laglig er leið.*
---
*Í Solberg vit áttu ein tílíkan varða,
sum serstakur var okkum øllum í bý,
sum fram um so mangan í vit mundi skara,
um lív hans "bert" fevndi um nærleið og líð.*

*Hann var í so mongum ein viti á vegi,
sum lýsti oss leið á sín serliga hátt,
í vási og verki í gerandisdegi,
í søgu og skemti á kvøldi og nátt.*

*Tí mugu vit sanna, nú Solberg er farin,
at tómt kenst í túni á hansara stað,
nú allir teir mongu, sum mannaðu garðin
í mold hava funnið sær grøv undir flag.*

*Nú tøgn er í stovu, har vinafjøld møtti
at gera upp alt tað, sum rørdist í bý,
har kæti so javnan teim stundina bøtti
við speiði og spølni og smíli á snýð.*

*Nú, Solberg er farin, ein tíð er at enda,
har vitborin frásøgn í stovu enn gekk,
har gerandisdagurin upp kom at venda,
og hvør sína fleingju for smásinni fekk.*

*Við Solberg vit mist hava mannin hin vísa,
sum sjálvlærdur røkti sítt univers'tet,
ið væl mundi bygd okkar listinlært lýsa,
for dygdir og brigdir og merkilig met.*



*Vit ynskja tær Solberg, nú fjallboð tey komu
frá hyrðanum hægsta til ovasta fjall,
at skurðin so góðan í haga tit nomu,
at sælur tú náddi tín himmalska stall.*
----
*Eg takki tær frændi for ferðalag,
har vit saman um fjøll hava stigið
á sumri og vetri so mangan dag:
"Mín vinur nú hvíl í Guds friði".*

**pmp**

## Eirikur aftur formaður



*Nevndin í Føroya Ellisakførum, f.v.: Finn Jespersen, Hans Jákup Michelsen, Hans Korsgaard, Eirikur Ólason Simonsen, Páll Danielsen, John Christiansen og Búgvi Apol*

Eirikur Ólason Simonsen er helst formaður aftur í felagnum Føroya Ellisakførum, sum hevði aðalfund leygardagin í hølunum yviri við Strond í Havn.

Øll nevndin varð afturvald, men hon hevur ikki skipað seg enn. Í nevndini eru: Eirikur Ólason Simonsen, sum varð valdur til formann í fjør, Hans Korsgaard, Páll Danielsen, Finn Jespersen og Hans Jákup Michelsen. Tiltakslimirnir eru eisini teir somu: Búgvi Apol og John Christiansen.

Í Føroya Elliakførum eru einir 160 limir.

Fyrsta stóra tiltakið hjá felagnum í ár er tann siðbundni túrurin hjá ellisakførum Flaggdagin, 25. apríl, frá Shell-støðini við Ringvegin í Havn.

Felagið roknar við, at mong ellisakfør vera aftur í ár. Tað er, at veteranbilarnir í Brunninum undir Gráasteini og allar tær gomlu motorsúkklurnar verða tiknar út og fara at koyra Flaggdagin.

Annars ætlar felagið at snøgga um hølini og økið rundandum húsið yviri við Strond.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Ingarð Karlsen**, fødd Olsen, ættað av Skála, andaðist í Stokke í Noregi mikudagin, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Stokke kirkju hósdagin klokkan 13.30.

**Dagurin**
**8. apríl. Janus.** Navnið er ókent í halgimannatali; sipar helst til ein Januaris í Suðuritaliu, sum varð tikin av døgum. Vensceslaus Ulricus Hammersheimb doyði hendan dagin í 1909, og Kristian Osvald Viderø doyði hendan dagin í 1991.

## Ársfundurin hjá Ferðslutrygd 2008



**Ráðið fyri Ferðslutrygd hevði ársfund hósdagin 3. apríl. Eini 45 fólk møttu til fundin, ið varð hildin á Hotel Føroyum. Sjálvur ársfundurin var fyrrapart, meðan seinnaparturin var settur av til tríggjar fyrilestrar um kommunalar ferðslutrygdarætlanir**

Á ársfundinum var nevndarval á skránni. Kári Thorsteinsson varð valdur til næstformann fyri Høgna Djurhuus, ið valdi at takka fyri seg á hesum sinni. Petur Elias Petersen varð nývaldur nevndarlimur. Hann kom inn fyri Duritu Bjellvåg, ið bar seg undan afturvali. Hinir báðir nevndarlimirnir, Hervør Hergudóttir og Finnleif Durhuus, vóru afturvaldir.

Til varalimir vórðu Sólfríð Fjallsbak, Jan Fossaberg og Árni Jacobsen vald.

Høgni í Stórustovu, formaður, og Sølvi R. Hansen, stjóri, greiddu frá virkseminum í farna árið. Heini Eysturoy frá Landsverki greiddi frá arbeiðinum at ferðslutryggja vegin gjøgnum Sandavág og Miðvág. Gunn H. Møller frá LBF greiddi frá arbeiðinum við at gera eina ætlan fyri Tvøroyri. Og at enda greiddi Britt-Mona Vang úr Karmøy frá arbeiðinum við 0-hugsjónsverkætlanini har. Teir tríggir fyrilestrarhaldararnir løgdu dent á hvør síni viðurskifti í arbeiðinum at orða kommunalar ætlanir.